# Eldur í maskinrúminum, ein saknaður kavari og tveir vilstir bjargamenn



**Kalbaksfjørður og Nólsoy vóru í gjár karmur um eina víðfevnda og fjøltáttaða samskipaða bjargingarvenjing millum eindir á landi og sjógvi**

VENJING
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*
*myndir: Jens Kristian Vang*

Nógvur útrykningur var at hoyra í Havn í gjár, tá fleiri ambulansur fóru við fullari ferð gjøgnum býin. Talan var tó ikki um nakra stóra vanlukku, men um eina stóra samskipaða venjing.

Venjingin byrjaði klokkan 16.05 við at Tórshavnradio fekk umbøn um hjálp av kavarum frá fiskiskipinum Tjaldrið.

Ein kavari á Tjaldrinum sum var við at skera trol av skrúvuni var løstaður av skrúvuni og sokkin til botns.

Manningin á Tjaldrinum hevði nógv um at verða tí roykur kom úr maskinrúminum og ein maður var saknaður umborð.

Seinni boðaði Tjaldrið frá at roykurin í maskinrúminum hevði ment seg og bað um roykkavara hjálp.

Í maskinrúminum vóru fýra skaddir persónar funnir.

### Skaddur kavari og vilstir bjargamenn

Um somu tíð fekk MRCC fráboðan frá politinum, at ein bátur, Pansarin, hevði boðað frá, at ein persónur sum hevði kavað frá bátinum flotnaði knappliga upp uttan luft fløskur og sá skaddur út. Teir høvdu fýra tímar frammanundan sett tveir mans á land í Nólsoy, har teir vildu klintra upp á Nevið.

Teir høvdu ikki givið boð frá sær sum avtala og Pansarin hevði maskintrupulleikar og kundi ikki koma tí skadda og saknaðu klintrandi persónunum til hjálpar.

### Hart strongdir

Venjingin var sera fjøltáttað. Av tí at tað vóru fleiri hendingar ísenn vóru allir partar hart strongdir.

Knud Rasmussen kom við figurantum og kavarar frá Knud Rasmussen vóru á botni fyri at heinta upp eina dukku. Roykkavarar frá Knud Rasmussen vóru sendir í maskinrúmi á Tjaldrinum fyri at sløkkja og heinta upp fýra skaddar persónar.

Tjaldrið var tað neyðstadda skipið har ein stórur partur av venjingini var lagdur.

Tyrlumanningin hevði nógv um at vera. Teir skuldu leita á sjónum eftir einum persóni og hiva skaddan persón upp av sjónum og flyta hann til landssjúkrahúsið. Teir endaðu við at undir torførum umstøðum at taka umborð teir tveir ið skuldu klintra upp á Nevið, sum skaddar og flyta teir til landssjúkrahúsið.

Lív var settur til at leita eftir einum persóni á sjónum og leita eftir teimum saknaðu persónunum í Nólsoy. Teir endaðu við at seta tann skadda í land á ísbryggjuni.

Pansarin setti tveir persónar í land í Nólsoy og var við sum figurantur í samband við tann skadda kavaran.

Sjúkraflutningstænastan vóru tríggjar ferð á Sundi eftir skaddum persónum og á ísbryggjuni eftir skaddum persóni.

Tilbúgvingarstovan sminkaði figurantarnar.

MRCC og Tórshavnradio samskipaðu venjingina.

Venjingin var liðug klokkan 19.40 og gekk sera væl.

Venjandi partarnir vóru, MRCC, Tórshavnradio, Atlantic Helecopters, Lív, Tjaldrið, Knud Rasmussen, Pansarin, Politiið, Sjúkraflutningstænastan, Færøernes Komando og Tilbúgvingarstovan.




**Sernámsdepilin**

## Samskipari til NSR tænastuna í Eysturoy

**náms- og sálarfrøðilig ráðgeving**

Av tí at samskiparin fer í farloyvi er eitt avbjóðandi og spennandi starv sum samskipari í NSR tænastuni í Eysturoynni leyst at søkja. Starvið er tíðaravmarkað frá 15. september 2009 – 31. juli 2010. Dagliga tænastustaðið verður NSR tænastan í Eysturoy, men er samskiparin partur av leiðsluni fyri sernámsfrøðiliga virkseminum, ið Sernámsdepilin stendur fyri.

**Førleikakrav:**
- útbúgving sum lærari ella pedagogur við eftirútbúgving og royndum
- og/ella kandidatur innan námsfrøði / psykologi

**Harumframt vænta vit, at umsøkjari:**
- hevur leiðsluroyndir
- kann menna sernámsfrøðiliga virksemi í skúlum og dagstovnum
- kann arbeiða sjálvstøðugt og hevur góð samstarvsevni

**Uppgávur:**
Arbeiðsuppgávurnar vera at leiða og fordeila arbeiðið í tænastueindini og skipa sernámsfrøðiliga virksemið í skúlum og dagstovnum í økinum.

**Vit bjóða:**
- áhugavert og avbjóðandi starv við fjølbroyttum uppgávum
- fakligt og námsfrøðiligt mennandi umhvørvi í tøttum samstarvi við starvsbólkarnar í hinum tænastueindunum og í Sernámsdeplinum
- førleikamenning eftir umstøðum og tørvi

**Setanartreytir:**
Starvið verður lønt sambært avtalu við Føroya Lærarafelag ella avvarðandi yrkisfelag.

Umsóknin, við avriti av prógvum, CV og øðrum viðkomandi skjølum, skal verða Sernámsdeplinum í hendi innan mikudagin 31. august 2009 kl. 16.00 og sendast til :

**Sernámsdepilin**
Frælsið 32 · Postrúm 2036 · FO 165 Argir
Tlf. 360200 · Faks 310196
Ella sum teldupost til: sernámsdepilin@snd.fo

Fleiri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Emmy Joensen, stjóra, á tlf. 360200.

Sernámsdepilin hevur ábyrgdina av at samskipa sernámsfrøðiligt virksemi og veita ráðgeving til foreldur, stovnar og skúlar o. ø. sum varða av børnum og ungum. NSR er stytting fyri náms- og sálarfrøðiligu ráðgeving depilsins. NSR- tænasturnar eru skipaðar í Eysturoynni, Suðuroynni og í Tórshavn.